# Sev skal hava fatur á 25 milliónum krónum

**DÝRARI STREYMUR** Sev kann longu nú verða noytt til at hækka prísin á streymi og talan verða um eina trivaliga hækking

Áki Bertholdsen

Sev er komið í neyð av hækkandi oljuprísum!

Hóast bara ein fjórðingur er farin av árinum, er tað longu nú greitt, at heldur hesin oljuprísurin sær, tað, ið eftir er av árinum, fara heilar 25 milliónir at mangla í á oljujáttanini hjá Sev.

Og Hákun Djurhuus, stjóri í Sev, ásannar, at tað er onki, sum bendir á, at oljuprísurin fer at lækka aftur við tað fyrsta.

Tað merkir, at antin fer hallið hjá Sev í ár at verða 25 milliónir hægri, enn tað annars er mett, at tað fer at verða.

Felagsskapurin hevur annars lagt eina fíggjarætlan í ár har tey hava væntað eitt hall upp á 32 milliónir.

- So skal alt hallið, sum hækkandi oljuprísurin førir við sær, leggjast oman á, fer Sev at hava eitt hall upp á 57 milliónir í ár.

Stjórin ásannar, at støðan er ómetaliga tórføur, men at leiðsla og nevnd arbeiða nú við ymsum ætlanum fyri at bøta um úrslitið.

### Ymsar loysnir

Arbeitt verður við ymsum loysnum.

Ein loysn er at lata hallið veksa hasar 25 milliónirnar.

Ein onnur loysn er at skilbøta raksturin og at skarva av umsitingini og teimum tænastum, sum Sev annars veitir.

Tað kann merkja, at ábøtur, røkt og útbyggingar verða drýggjaðar og tað kann fáa avleiðingar fyri el veitingina við fleiri streymslitum.

Ein triði møguleiki er at hækka prísin og tað er eisini ein sannlíkur møguleiki, staðfestir Hákun Djurhuus.

Hann sigur, at hvørja ferð prísurin á streymi hækkar 10 oyru fyri hvørt kilowatt, gevur tað Sev 27 milliónir í kassan.

Men ein príshækking kann ikki verða sett í gildið fyrrenn árið er hálvrunnið og tískil verður talan um eina príshækking upp heili á 20 oyru fyri hvørt kilowatt, umframt mvg, ella 25 oyru tilsamans.

Talan kann eisini verða ein samanrenning av hesum trimum loysnunum.

- Tað veldst alt um, hvat eigararnir, sum eru kommununar, siga, men tað veldst eisini um, hvat fíggingarstovnarnar siga, ásannar Hákun Djurhuus.

Hækkar prísurin 25 oyru fyri hvørt kilowatt, fer tað at geva hvørjum húsarhaldi eina eykarokning upp á 1000 krónur um árið.

Hendan príshækkingin kemur so oman á hækkingini upp á 18,75 oyru fyri hvørt kilowatt, sum prísurin hækkaði á nýggjárinum.

*aki@sosialurin.fo*

**» Verður onki gjørt, verður hallið hjá Sev 57 milliónir í ár**



**SEV Í TRUPULLEIKUM**

*Støðan hjá Sev er álvarslig, tí verða ongi stig tikin, verður hallið hjá orkufelagnum heilar 57 milliónir í ár*

# Ferðaætlanin má skerjast munandi

**» Tað verða munandi skerjingar í túratalinum**

**SKRÆDL** Fær Strandferðslan ikki eina fíggjarliga innspræning, verður rættiligt skrædl við nógv dýrari ferðaseðlum og nógv færri túrum

Áki Bertholdsen

Strandferðslan er komin í knípu.

Eina rættiliga stóra knípu.

Tá ið fíggjarlógin fyri í ár varð samtykt, varð samstundis staðfest, at við teimum oljuprísum, sum tá vóru, fór tað at verða ein kampur hjá Strandferðsluna at halda játtanina, tí hon var so tepur.

Men síðani er ojuprísurin rættiliga nógv hækkaður.

Tað merkir, at heldur hesin oljuprísurin sær, fer Strandferðslan at hava eitt hall upp á einar 10 milliónir krónur, uttan so at tiltøk verða sett í verk.

Og Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, ásannar, at skal Strandferðslan spara 10 milliónir, verður neyðugt við so álvarsligum stigum, at hann vil næstan kalla tað bygnaðarligar broytingar á Strandferðsluni, bæði hvat ferðaseðlaprísum og ferðaætlan viðvíkur.

- Hetta fer at føra til eina heilt munandi skerjing í túratalinum, staðfestir hann.

Hann sigur, at hann hevur boðað landsstýrismanninum í vinnumálum frá støðuni, tí Strandferðslan vil ikki seta so ógvuslig tiltøk í verk uttan at boða politiska myndugleikunum frá.

### Fáa hægri játtan

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, segði við Rás2 í gjár, at tað er neyvan politiskur meiriluti fyri at skerja túratal ella at hækka prísirnar á ferðaseðlum.

Tí fer hann at hann biðja um politiska undirtøku fyri at útvega Strandferðsluni eina eykajáttan, so at tað ber til at varðveita túratal og ferðaseðlaprísir.

Hann staðfestir, at gongdin í oljuprísinum er ein stórur trupulleiki og tað ber ikki til at broyta ferðaætlanina alla tíðina eftir gongdini í oljuprísinum.

Tí er ætlanin at stovna eina serliga oljukontu, har ein ávís upphædd verður sett á. Verður nýtslan minni, fellur tað aftur til landskassan og røkkur hon ikki til, verður játtanin hækka.

*aki@sosialurin.fo*

## Óbroytt

Tá ið fíggjarlógin fyri í ár varð samtykt á jólum, legði politiski myndugleikin upp til, at ferðaseðlaprísirnir hjá Strandferðsluni skuldu ikki hækka í ár og túratalið skuldi ikki lækka.

Annars varð samtykt at áleggja eitt serligt umhvørvisavgjald á alla olju, eisini oljuna, sum skipini hjá Strandferðsluni brúkar.

Men í evstu løtu varð samtykt at frítaka Strandferðsluna fyri hetta serliga oljuavgjaldið.

Tað fekk politiska myndugleikan at niðurfesta í sjálva fíggjarlógina at hetta viðførir, at " Harvið verða ferðaseðlakostnaðir og túratal óbroytt komandi ár", sum stað stendur í fíggjarlógini.

Hetta er ein politisk staðfesting av, at bæði túratal og ferðaseðlaprísir skulu varðveitast í ár, til onnur boð koma frá politiska myndugleikanum.

Í kann Strandferðslan ikki av sínum eintingum skerja túratalið ella hækka prísin, uttan í samráð við politiska myndugleikan.